# Gera nýtt mentanarráð

Løgmaður segði í røðu síni á ólavsøku, at eitt nýtt og óheft mentanarráð skal setast á stovn.

Hetta mentanarráð skal veita landsstýrinum ráðgeving og vegleiðing í spurningum, sum snúgva seg um mentanarviðurskifti í breiðum týdningi.

Ætlanin er, at hetta mentanarráðið skal koma við eini árligari frágreiðing, og møguleiki skal eisini verða hjá landsstýrismanninum í mentamálum at leggja mál fyri ráðið at viðgera og ummæla.

**ek**

# Fiskifrøðingar sleppa ikki at avgera



**Fiskiskapurin undir Føroyum kann ikki bara verða stýrdur av lívfrøðisligum metingum. Samfelagslig atlit mugu eisini takast, heldur løgmaður**

LØGMANSRØÐAN
*Eyðun Klakstein*

Løgmaður gjørdi í løgmansrøðuni greitt, at tað verða ikki metingarnar hjá fiskifrøðingunum einsamallar, sum koma at gera av, hvussu fiskiskapurin undir Føroyum verður skipaður.

– Hjá Føroyum er fiskivinnan so stórur partur av búskapinum, at fyrivarnsreglan í fiskiskapinum ikki bert kann virka eftir lívfrøðiligum metinum.

–Samfelagsbúskapurin er so viðbrekin, og tí mugu broytingar ikki vera ov stórar. Samfelagslig og lívfrøðilig fyrivarni eiga tí at virka saman, tá tosað verður um fyrivarnsregluna, segði Anfinn Kallsberg í tinginum á ólavsøku.

## Sum best í longdini

Løgmaður legði dent á, at tað eru føroyingar, sum hava ábyrgdina av tilfeinginum í sjónum kring oyggjarnar, og at tað eigur at verða farið varisliga fram í umsitingini av hesum tilfeingi.

– Fiskatilfeingið skal umsitast og troytast øllum samfelagnum at frama. Eitt av høvuðsstevnumiðunum í umsitingini av fiskastovnunum í føroyskum sjógvi er at tryggja, at teir verða gagnnýttir skynsamt, segði Anfinn Kallsberg í røðu síni.

Hann segði eisini, at fiskastovnarnir skulu gagnnýtast eftir tilmæltum fiskidøgum, so teir í longdini geva sum mest til samfelagið.

– Hildið verður fast um fiskidagaskipanina sum høvuðsamboð í stýringini av fiskiskapinum, og málið er, at allir skipabólkar koma undir dagaskipanina.

# Løgmansrøðan frøir norðoyingar

**Orðingar í løgmansrøðuni benda á, at norðoyingar eru komnir eitt stig nærri føstum vegasambandi við meginøkið. Í røðuni umtalar løgmaður undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørði, sum var hann longu samtyktur á tingi. Borgarstjórin í Klaksvík frøist**



LØGMANSRØÐA
*Rúnar Reistrup*

Visti tú ikki betur, kundi tú hildið, at tingið fyri langari tíð síðan hevði samtykt at fara undir at gera undirsjóvartunnil til Klaksvíkar. Í Løgmansrøðuni verður tunnilin undir Leirvíksfirði í tveimum førum umtalaður sum var hann longu settur á fíggjarlógina.

Í framløguni á ólavsøku segði Løgmaður:

»...arbeiði við Vágatunnlinum er komið væl áleiðis. Hol er sett á at gera tunnil til Gásadals, og fyrireikingar eru byrjaðar til ein tunnil undir Leirvíksfjørð og at byggja nýtt skip til Suðuroyarsiglingina«

Og í útgreiningini av Løgmansrøðuni stendur at lesa:

»Ein av fremstu fyritreytunum fyri menningini av vinnuni og samfelagnum sum heild er eitt væl útbygt undirstøðukervi. Á hesum øki standa stórar íløgur fyri framman so sum tunnil undir Leirvíksfjørð, nýtt skip til Suðuroyarsiglingina, samferðsluhavn á Tvøroyri umframt aðrar størri og smærri íløgur.«

## Nýggir tónar

Hetta hevur borgarstjórin í Klaksvík, sum er heitur fortalari fyri føstum sambandi um Leirvíksfjørð, bitið merki í. Hann tekur tað sum eitt tekin um at tað arbeiði, sum hann og onnur hava lagt í at tala fyri undirsjóvartunnli millum Leirvík og Klaksvík, hevur borið ávøkst, og frøist um nýggju tónarnar, ið vóru at hoyra í Løgmansrøðuni.

– Man hevur ikki hoyrt hatta frá samgonguni fyrr. Hatta eru nokkso nýggir tónar. Men tá løgmaður spælir so kraftiga út, so man tað vera tí at samgongan er samd um hetta, og tað gleðir meg, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu.

## Valagn ella ikki

Løgmansrøðan var byrjanin til seinastu tingsetuna í hesum valskeiði, og uttan iva verður komandi tíðin merkt av, at bæði samgonga og andstøða fara at egna sum best undan valinum. Men borgarstjórin í Klaksvík velur kortini at tulka orðingarnar í Løgmansrøðuni sum at tað er ein veruligur vilji í samgonguni at fara undir undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð.

– Tað er rættiliga freistandi hjá øllum politikarum at spæla við nú, men eg havi góðar vónir um at undirsjóvartunnilin nú verður raðfestur á íløguætlanini. Eg trúgvi at løgmaður meinar tað, sum hann sigur, og eg haldi at flestu politikarar síggja álvaran í hesum her. Teir síggja at tað ikki ber til at bíða longur eftir føstum sambandi um Leirvíksfjørð.

## Noyðast at taka undir

Vágatunnilin var valagn hjá at kalla øllum flokkum á seinasta løgtingsvali. Og hann er nú komin væl áleiðis. Tí passar tað í høvuðsheitinum borgarstjóranum í Klaksvík væl, at tað er valár nú, og tunnilin um Leirvíksfjørð verður brúktur sum valagn

– Tað harmar meg eitt sindur, at undirsjóvartunnilin verður brúktur sum valagn, tí eg haldi, at hetta málið er meira álvarsligt enn sum so. Men hinvegin so skundar tað helst undir gongdina í málinum, at tað stundar ímóti vali. Eg trúgvi, at søgan fer at endurtaka seg undan komandi løgtingsvali, soleiðis at allir flokkar tá verða samdir um at gera tunnil undir Leirvíksfjørð. Tað verða teir næstan noyddir til, um teir ikki skulu missa andlit her norðuri, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg



